

# Grønlandi nýtist ikki oljupengar

**Jan Müller**

16.03.2014 - 07:01

Oljan.fo

Fiskivinnan, ferðavinnan og námsvinnan kunnu tetta holini í grønlendska búskapinum, sum sostatt ikki hevur brúk fyri oljupengum.

Tað er í stuttum niðurstøðan í einari frágreiðing, sum greiningarfyritøkan Rambøll hevur gjørt.

Útrokningar vísa, at um 10 ár fara 600 milliónir krónur at resta í um árið til at fíggja vælferðina Grønlandi. Tí hava grønlendingar lagt seg eftir at finna olju og at selja uran fyri at loysa komandi fíggjartrupulleikar, men sambært Henrik Rosenberg Seiding hjá Rambøll er tað ikki neyðugt hjá Grønlandi at lata havið upp fyri oljuleiting.

-Grønland kann fáa tær neyðugu inntøkurnar uttan oljuna, og teimum nýtist ikki at bíða 10 ár eftir hesum, tí tað kann lata seg gera longu nú, sigur Rambøll-stjórin við metroxpress.

**Til verka beinanvegin**

Tað er umhvørvisverndarfelagsskapurin Greenpeace, sum hevur fíggjað kanningina, og har eru tey fegin um niðurstøðuna.

-Vit eru sera fegin um, at frágreiðingin vísir, at tað ber til hjá Grønlandi at sleppa uttan um tær vandafullu oljuboringarnar, sigur Jon Burgwald hjá Greenpeace við metroxpress.

Men sambært Rambøll kunnu grønlendingar ikki seta seg afturá.

-Skal Grønland fáa ferð á teir nýggju inntøkumøguleikarnar innan fiskivinnu, ferðavinnu, landbúnað og námsvinnu, mugu politikararnir til arbeiðis beinanvegin, skrivar greiningarfyritøkan í frágreiðingini.